# Tvær konsertir fyri Ísraelsferð



*Í fjør vóru eisini føroyingar á missiónsferð í Ísrael, hagani henda myndin stavar. Farið verður aftur í ár, og í hesum samband verða tvær konsertir um vikuskiftið*

**Í summar fer eitt toymi hjá Heimamissiónini til Ísraels at boða gleðiboðskapin millum ítróttarfólk. Tað er í hesum sambandi at skipað verður fyri ikki færri enn tveimum konsertum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið**

KONSERT
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Fyrra konsertin er kl. 19 og tá luttaka Siloa-kórið úr Fuglafirði, Magni Christiansen og Heine Lützen.

Seinna konsertin byrjar kl. 22.30, og tá luttaka bólkurin Proclaim, Petur Háberg og Gunnar G. Guttesen.

- Tann fyrra konsertin verður ein sitikonsert, meðan ein ikki noyðist at sita niðri við ta seinnu, sigur ein av fyrireikarunum Ragnhard Petersen í Fuglafirði.

Í sambandi við seinnu konsertina koyra bussar frá KFUM&K í Klaksvík, missiónshúsinum á Toftum, úr Meinigheitshúsinum í Havn og frá missiónshúsinum í Miðvági.

- Vit hava havt atgongumerki í forsølu. Men í annaðkvøld gera vit tað soleiðis, at atgongumerki við dyrnar kosta 120 kr. fyri aðra konsertina og 180 kr. fyri báðar, sigur Ragnhard.

Seinni í summar fer hetta serstaka Ísraels-toymið so avstað til Ísraels. Ætlanin er at tey skulu arbeiða á tveimum økjum innan ta tey nevna ítróttar-missión.

Í fyrsta lagi ber til at arbeiða millum elitu-ítróttarfólk, og í øðrum millum børn og ung innan ymiskar ítróttargreinar. Uppgávan verður saman við ítróttarligu avrikunum at bera ítróttarfólkunum gleðiboðskapin.





## Upplíva vakra og søguliga økið the Cotswolds í Miðonglandi

...spennandi útferðir hvønn dag

Royn fótasporini hjá Winston Churchill, Shakespeare og øðrum mætum onglendingum. Í the Cotswolds kanst tú upplíva klassiska Ongland við miðaldarborgum og vøkrum gørðum. Far heilt aftur í søguna og fá kensluna av sterku, ensku mentanini við mætum bardøgum men eisini te og bókmentum í væl røktum blómugørðum. Vitja verður millum annað:

- Barnaheimið hjá Winston Churchill, barokkslottið Blenheim Palace
- Gravstaðurin hjá Churchill, Bladen
- Vakri havin Mill Dene Garden og smáttuna Brook Cottage
- Harragarðurin úr miðøld, Broughton Castle, og góðsið Charlecote Park
- Føðistaðurin hjá Shakespeare, Stratford-upon-Avon
- Cream Tea í eini hugnaligari bygd í Cotswold
- Miðaldarborgin Warwick Castle
- London - Tower of London, Big Ben,
- Piccadilly Circus og St Paul's Cathedral

Smávegis broytingar í ferðaætlanin kunnu koma fyri.

Meira kann lesast um støðini á **www.the-cotswolds.org** og **www.londontown.com.**

**Íroknað ferðina er:** Flogferð Vágar-Stansted og aftur við øllum avgjøldum, innivist í 7 nætur við morgunmati og døgurða, allar útferðir og atgongugjøld, bussur í 8 dagar við skandinaviskum ferðaleiðara.

Kostnaður fyri hvønn í dupultkamari:

**11.750,-**

Eyka fyri einakamar:
2.290,-

*Ferðin er treytað av, at í minsta lagi 20 fólk tekna seg. Seinasta freist at tekna seg er týsdag 26. juni 2007.*

Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways ella frá: **Faroe Travel**, tel 34 26 00 · **Flogfelag Føroya**, tel 34 00 00 · **Fonn Flog**, tel 47 63 63

Tel 34 10 10 · Fax 34 10 01 **ATLANTIC AIRWAYS** atlantic.fo



**RUKO LÁSATÆNASTA**

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem

Vit eru serkønir á økinum



**VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ** · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20